


*Ættin hjá Honnu savnaðist í Føroyum í summar. Her eru tey avmyndað uttanfyri Sosialin*

tann vegin. So vísi eg passið, og passeftirlitsmaðurin sigur okkurt á hollendskum. Eg svari aftur, at eg dugi ikki hollendskt. Um eg ikki var hollendsk? Jú, men tað var nú ein longri søga. Passeftirlitið helt, at tað mundi okkurt løgið vera við hesum, so hann bað meg koma við sær. Eg var biðin um at koma við honum inn í eitt rúm, so vit kundu fáa greiðu á hesum. Síðan varð eg biðin um at bíða, so skuldi hann koma aftur. Hann kom so aftur við einum øðrum manni. Teir so at tráspyrja meg. Eg hevði nú góða samvitsku, so eg var ikki bangin. Tað, sum eg var bangin fyri, var fastur mína, sum skuldi koma at taka ímóti mær. Hon stóð uttanfyri og bíðaði. Tá eg ikki kom fram, mundi hon halda, at eg ikki var við, og kundi fara avstað aftur. Eg mátti so greiða frá allari míni lívssøgu, sum teir skrivaðu niður.

Tá slapp eg avstað, men eg mátti eisini regluliga boðað frá, hvar eg var stødd. Hetta var nokk so skjótt eftir kríggið, so teir máttu sjálvandi ansa væl eftir, hvør ið kom inn í landið. Tað var tí ikki løgið, um teir fingu illgruna til ein persón við hollendskum passi, sum ikki dugdi málið! Hetta kundi jú verið ein týskur nasistur, sum royndi at flýggja!

Tá ið eg fór avstað aftur var eingin trupulleiki við málinum.



*Holland er slætt sum ein pannikøka. Tað var ikki so løgið um gentan úr Norðradali ikki kundi trívast har*

## Giftust í Hollandi og búsettust í Onglandi

**Harry:**
Eg fór seinni til Hollands aftaná henni. Vit giftust á borgmeistaraskrivstovuni í Haag 24. marts 1948. Aftan á fóru vit til ensku kirkjuna í býnum at fáa kirkjuligu vígsluna. Síðan fóru vit at vitja fólk, sum eg kendi í Hollandi. Tá ið vit komi inn á gólvið hjá onkrum og eg segði, at hetta var kona mín, søgdu tey: Groningen! Tey hildu, at hon hevði eitt eyðkent Groningen andlit. Groningen er tann landspartur í Hollandi, haðani Hanna var ættað.

**Hanna:**
Tá vit komu heim úr Hollandi eftir at vit vóru gift fingu vit skjótt eini hús til leigu. Eg var so glað, tá ið eg fekk mítt egna. Mær dámdi einki, um onkur fanst at onkrum. Hetta var bara eitt slott fyri meg, og eg føldi meg sum ein prinsessa at hava fingið eini slík hús. Vit høvdu allar hentleikar. Men fýrt var við koli. Húsini vóru spildurnýggj.

Vit komu at kenna nógv fólk har rundan um. Grannarnir vóru sera fittir.

## Harry: Fór at lesa til arkitekt

Tá ið vit vóru gift fóru vit aftur til Bretlands. Tá høvdu vit ikki hús men búðu heima hjá mínum foreldrum.

Tá fór eg aftur at lesa til arkitekt. Eg byrjaði at lesa áðrenn kríggið, men mátti so gevast, tá ið eg fór í herin.

Av hesi orsøk fekk eg eisini ein eyka almennan stuðul, tí mín virkisleið jú varð avbrotin. Eg las so trý ár afturat og gjørdist liðugur sum arkitektur í 1950. Í eini seks ár var eg býararkitekur í Salford, sum liggur nærindis Manchester.

## Til Isle of Man

Tá ið eg gavst har, fór eg at arbeiða fyri stjórnina á Isle of Man, har búðu vit í fýra ár. Vit búðu norðanfyri høvuðsstaðin Douglas, har tað er ómetaliga vakurt. Hanna kendi longu Isle of Man frá tí, hon kom til Bretlands á fyrsta sinni. Eg hevði eisini verið har áðrenn kríggið, so eg kendi væl plássið.

Ein sera góður vinur hjá Honnu búði í Douglas. Hon var úr Skálavík og æt Karolina Simonsen. Hon giftist eftir kríggið við einum sjómanni frá Man og búsettist her. Hann var eitt sindur serligur. Hann hevði siglt í Royal Navy, og hann hevði siglt á Yangtse ánni í Kina. Hann var kendur har, tí hann hevði verið á eini veðurstøð.

Tey vóru har alla tíðina, vit vóru á Isle of Man. Tá ið tey fluttu til Manchester hittu vit tey har, og vit sóðu fleiri av teirra børnum.

Karolina og maður hennara doyðu fyri mongu árum síðani, men vit hava framvegis samband við øll børnini hjá teimum.

Eg hevði fegin viljað búð á Man, men lønin var ikki góð. Tá komu vit til Hull. Tá ið vit fóru av Man í 1959 var fólkatalið 48.000. Síðan er fólkatalið munandi hækkað. Oyggin er gjørd til ein fíggjardepil og lágskattaland, sum hevur stuðlað væl upp undir fólkavøksturin. Oyggin er sjálvstøðug, men hevur tó uttanríkis- og verjupolitikk saman við UK. Fyri hesa felags umsiting rindar Isle of Man sín part av ómakinum.

Tað hevur annars verið eitt søguligt samband millum Føroyar og Man. Quilling, kendur frá Quillinggarði í Havn, kom haðani. Hetta er eitt eyðkent manskt navn. Hann er annars eisini grivin í gamla kirkjugarði í Havn.

**Komandi partur**

Í komandi parti verður millum annað greitt frá føroyingum, Harry og Hanna hava hitt í Bretlandi og um hvussu góð umboð tey hava verið fyri Føroyar.